**Í BÍÐISTØÐU**

*Mads Andreas Winther var vónríkur, tá ið hann fyri trimum árum síðani greiddi Sosialinum frá risaverkætlan síni uppi á Hálsi í Havn, men síðani er nógv broytt og nú bíðar hann*



## Luksushotell og upplivingardepil

**Ásannast má, at Mads Andreas Winther, hugsaði stórt, tá ið hann fyri trimum árum síðani greiddi Sosialinum frá ætlanunum, hann hevði fyri økinum uppi á Hálsi í Havn. Í 2012 skuldi økið verða bygt við einum 40 metra høgum luksushotelli í 10 hæddum og og einum upplivingardepli við svimjihøll, venjingarmiðstøð, vælverumiðstøð, bowlinghøll, matstovum, biografi, leikalandi til børnini og handlum í hópatali. Og alt samalt skuldi verða samanbundið við eini innandura gongugøtu fyri at tað skuldi bera til at ferðast turrskøddur ímillum allar hentleikarnar.**

**Miðdepilin í øllum skuldi verða eitt torg við trøðum og plantum og stórum glasveggjum.**

# Dreymurin bíðar eftir betri tíðum

**MIÐLENDIÐ** Dreymurin hjá Mads Andreas Winther um at byggja luksushotel og ein slóðbrótandi upplivingardepil í Havn, er fyribils lagdur í skuffuna

Áki Bertholdsen

Hevði tað gingið sum ætlað, hevði umhvarvið av einum luksusotelli í 10 hæddum og einum upplivingardepli í milliardklassanum, verið týðiligt á luftini uppi á Hálsi í Havn.

Men so kom stígur í búskapin og nú er alt lagt í skuffuna til tíðirnar batna aftur.

Tað var í jólamánaðinum í 2007, at Mads Andreas Winther, stjóri í Miðlon, greiddi Sosialinum frá um sínari framsjón um økið rundan um Miðlon.

Eftir ætlanini, sum hann nevndi Miðlendið, skuldi tað longu vera fyrsti einum ár síðani at fyrsti spakin skuldi setast í til at byggja eitt luksushotell og upplivingadepli við hentleikum av øllum handa slagi.

Men sum so mangur annar má hann staðfesta, at kreppan, sum kom, endavendi øllum og nú dugir hann ikki at siga, nær ætlanin verður veruleiki.

Men hann leggur kortini dent á, at hann hevur ikki slept ætlanini.

– Tað hevur ikki gingið eftir vild og nú mugu vit ásanna, at hetta er ikki akkurát rætta tíðin at fara undir so stóra ætlan, sigur hann við Sosialin.

– Vit halda framvegis, at hetta er ein góð ætlan og vit trúgva framvegis upp á hana. Vit hava bara lagt hana í skuffuna og nú bíða vit eftir, at tíðin er búgvin at taka hana framaftur, sigur Mads Andreas Winther.

– Nær tað kann vera, hevur hann onga hóming av, tí tað veldst um, nær tíðirnar venda aftur.

Men hann heldur, at tað kann vera, at tað ikki verður fyrrenn einaferð næsta ár, áðrenn ætlanin um Miðlendi verður tikin upp aftur úr skuffuni.

Hann leggur afturat, at av tí, at teir hava lagt ætlanina á hillina fyribils, hava tey heldur onki gjørt fyri at útvega fígging til íløguna, sum helst kemur upp í milliardklassan.

*aki@sosialurin.fo*

# Hoyribrekað sleppa við skrekkinum

**EGINGJALD** Hoyribrekað sleppa undan egingjaldið fyri hoyritól – í hvussu so er í fyrstu syftu

Áki Bertholdsen

Uppskotið um at áleggja hoyribrekaðum eitt brúkaragjald upp á 2000 krónur fyri hvørt hoyriapparat tey útvega, varð ikki samtykt í Løgtinginum í gjár, sum ætlað.

Ætlanin hevur fingið harða mótstøðu, tí verður tað samtykt, fer tað at kosta einum hoyribrekaðum, sum skal hava hoyriapparat til bæði oyru, 4000 krónur og tað er ikki smávegis útreiðsla hjá pensjónistum, sum eru tey, sum mest hava brúk fyri hoyriapparati.

Ein atfinning ímóti ætlanini er, at hon egingjaldið fyri hoyriapparat er ikki ásett eftir inntøkuni, so at tey, sum hava góða inntøku betala meir og tey við lágari inntøku, betala minni.

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, gjørdi greitt, at Javnaðarflokkurin kundi ikki góðtaka, at egingjaldið verður tað sama fyri øll og at tað sostatt ikki verður sett eftir inntøkuni.

Tað hevði flokkurin langt síðani boðað frá og tí vildi hann hava, at Rósa Samuelsen legði uppskot fyri Løgtingið í seinasta lagið 1. mai um at egingjaldið skuldi vera eftir egingjaldið.

Hetta er eisini tað, sum meirilutin í trivnaðarnevndini hjá Løgtinginum mælir til.

### Sparingin í vanda

Landsstýriskvinnan í almannamálum staðfesti, at talan er um eitt spariuppskot burturav. Men skal tað inntøkuregulerast, verður helst ongin sparing, tí tey flestu, sum hava brúk fyri hoyriapparatum, eru pensjónistar við lágari inntøku og sum sostatt lítið og onki skulu betala sjálvi.

Hon er heldur ikki vís í, at hon klárar at koma við einum uppskoti í vár um at inntøkuregulera egingjaldið frá 1. mai, tí arbeiðsumstøður eru ikki til tað.

Hon segði, at tað er umfatandi at gera egingjaldið inntøkuregulerað, tí spurningurin er, hvussu lág inntøkan skal vera fyri at fáa fullan stuðul og hvussu stuðulin skal minkast eftir inntøkuni.

Spurningurin er eisini um stuðulin eisini skal umfata privatar hoyriklinikkir.

Landsstýriskvinnan førdi eisini fram, at skal egingjald á hoyriapparat, skal málsøkið helst leggjast undir Almannastovuni og so skal audiologur fylgja við yvir á Almannastovuna, samstundis sum oyralæknin er á Landssjúkrahúsinum.

– Og so eru vit í teirri óhepnu støðu, at vald og gjald ikki fylgjast, legði hon afturat.

Men hon helt eisini, at tað er skeivt at taka hoyriapparat burtur úr allari rúgvuni av hjálpartólum og leggja hoyrigjald á tey.

> **Hetta er eitt spari-tiltak burturav**

### Ein fortreyt

Tað hevði verið rættari at tikið øll hjálpartól undir einum, segði Rósa Samuelsen.

Tí heldur hon, at tíðin stutt at finna eina politisku semju.

Men tað, hon stúrir mest fyri, er, at hon klárar ikki at halda játtanina á fíggjarlógini.

> **Egin-gjald setir sparingina í vanda**

Hon vísti eisini á, at ein fortreyt fyri at halda játtanina á fíggjarlógini, er, at uppskotið verður samtykt sum tað liggur –altso uttan at egingjaldið verður inntøkuregulerað.

Skal egingjaldið til hoyriapparat hinvegin inntøkuøregulerast, skulu sparingar finnast aðrastaðni og tað sær hon ongar møguleikar fyri

Niðurstøðan var, at Løgtingið kom ongantíð til at atkvøða um málið. Tvørtur ímóti varð tað beint aftur í trivnaðarnevndina til víðari viðgerð.

*aki@sosialurin.fo*